Ikki lætt at lækka lønir

Nú tann íslendski ríkiskassin skal spara sum mest, hava politikararnir millum annað hugt at, um tað ber til at lækka lønirnar almennum starvsfólki. Í hesum viðfangi hevur Altingið fingið eitt yvirlit, sum vísir, at í mars forvunnu 454 av teimum 18.000 almennu starvsfólkunum meiri enn eina millión íslendskar krónur. Tingmaðurin Skúli Helgason, sum er við til at endurskoða tær almennu útreiðslurnar, sigur við Morgunblaðið, at tað er lættari sagt enn gjørt at lækka lønirnar hjá teimum almennu starvsfólkunum, tí at talan er um fleiri ymiskar sáttmálar. Hann leggur tó afturat, at í verandi støðu er neyðugt, at teir breiðastu herðarnir bera tær tyngstu byrðarnar.

Krabbamein verri fyri menn

Nýggjar kanningar í Bretlandi vísa, at tað er vandameiri fyri menn enn kvinnur at fáa krabbamein, og harafturat er vandin fyri, at menn fáa krabbamein, 16 prosent størri, enn hann er hjá kvinnum. Tað vísa kanningar, sum stovnarnir National Cancer Intelligence Network og Cancer Research UK hava gjørt. Svend Aage Madsen, sum er formaður í danska felagsskapinum Selskab for Mænds Sundhed, sigur við DR, at tær bretsku kanningarnar eru enn ein ávaring til menn um, hvussu umráðandi lívsstílurin er, um hvussu umráðandi tað er at varnast týðandi tekin og at fara til læknan, tá okkurt er áfatt.

nstevnu

- Skráin fyri eystanstevnu er rættiliga rúgvusmikil. Hon er fjølbroytt og áhugaverd, og her er alt frá ítrótti til mentan og undirhald av ymiskum slagi – og fyri øll, sigur Herbjørg H. Jøkladal, leiðari á Kunningarstovuni í Saltangará

Letur stóra gávu til bygdarhús í Skúvoy

Skúvoyingar hava nú skipað eina fyribilsnevnd, sum fer at kanna møguleikarnar fyri einum bygdahúsi í bygdini. Orsøkin til, at hetta arbeiði nú er sett á kjøl, er, at ein pensjónerað og uppilagstur navigatørur í Skúvoy ynskir at geva bygdini 200.000 krónur til hetta endamál

SKÚVOY

Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Seinastu árini hava sæð, at glaðir gevarar eisini finnast í Føroyum, og ikki minst hava vit verið vitni til hetta í Sandoynni, har stórar gávur eru givnar bæði til Sands og Skálavíkar.

Nú kann Sosialurin so eisini "avdúka" ein annan glaðan gevara, sum er uppilagsti navigatørurin í Skúvoy, Jóannes Poulsen, sum er ógiftur.

Fyribilsnevnd

Tá tað skiltist, at skúvoyingurin vildi lata bygdini hesa gávu til eitt hvørt tiltak, sum kundi hjálpa bygdini frameftir, tóku skúvoyingar seg saman og fóru á fund um at endurstovna bygdarfelagið.

Kjartan Hentze sigur, at hesin fundur varð hildin í missiónshúsinum í Skúvoy fyri stuttum, og tá valdi fundurin eina fyribilsnevnd til endurstovnan av bygdarfelagnum.

Hetta er ein trímannanevnd, har Kjartan er valdur til fyribils formann. Hinir báðir í nevndini eru Dánjal Hentze og Jákup Poulsen, allir við ættarbondum í Skúvoy.

Tá vit høvdu Kjartan í telefonini í morgun, segði hann seg ikki vita heilt ítøkiliga, hvussu málið um gávuna tók seg upp, men heldur, at tað var familjan hjá gevaranum, sum bar ynski hjá honum fram.

- Gevarin vil lata hesar 200.000 krónurnar til okkurt, sum kann hjálpa bygdini, sum Kjartan tekur til

Sosialurin skilir á Kjartani, at hann ikki er so glaður fyri, at vit siga fyri okkara lesarum, hvør gevarin er, men í Skúvoy búgva bert 25-30 fólk, og tí halda vit ikki, at nøkur meining er í ikki at siga, hvør gávumildi skúvoyingurin er.

Góðar stundir

Í Skúvoy hevur eins og í flestu øðrum bygdum verið bygdarfelag, men hetta felag hevur ikki verið virkið í fleiri ár.

- Vit kunnu siga, at vit við fundinum í Skúvoy herfyri endurstovnaðu hetta felag, og nú fara vit at hyggja at, hvørjir møguleikar eru fyri at útvega okkum tak yvir høvdið.

Kjartan sigur, at kommunan eigur onkur øki, um bygging skuldi komið upp á tal, men í løtuni dugir hann ikki at siga, um hetta fer at gerast aktuelt.

- Vit fara at geva okkum góðar stundir og fara ikki at leypa framav. Í bygdini eru nøkur tóm hús, og kanska fara vit eisini at hyggja at, um onkur hús kunnu útvegast og møguliga umbyggjast til bygdarhús. Alt hetta er so nýtt enn, og fyrr enn vit hava hugt upp á teir møguleikar, sum er, kann eg einki siga um, hvussu peningurin, sum gevarin ynskir at lata bygdini, verður brúktur, sigur Kjartan Hentze.

Skúvoyingar hava nú skipað eina fyribilsnevnd, sum fer at hyggja uppá, hvussu peningur, sum ein gevari í Skúvoy vil lata bygdini, kann brúkast best